# Vil verja drunnhvítan




*Hesum skelti møta øll ferðafólk, sum koma í land av Ternuni í Nólsoy*

Mynd: Leo Poulsen

**Tórshavnar kommuna tekur nú stig til at verja um drunnhvítan í Nólsoy og um fuglalívið í oynni sum heild. Eisini skal endaliga staðfestast, um rotta er komin í oynna**

Leo Poulsen

Árið í ár er lívfrøðiligt margfeldisár, og í tí sambandi eru allir borgarstjórar í Føroyum útróptir til verjar hjá ymiskum fugla- og fiskasløgum. Og sum rímiligt er fall tað Heðin Mortensen í lut at gerast verji hjá drunnhvítanum.

Nólsoy er í Havnar kommunu, og í oynni finst heimsins størsta koloni av drunnhvíta, og nú borgarstjórin í Havn er vorðin verji hjá drunnhvítanum, ætlar hann sær at gera nakað við málið.

- Vit hava nú sett skelti upp á Klivum, har fólk koma í land av Ternuni, har greitt verður frá um drunnhvítan, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur tað hava stóran týdning, at fólk vanda sær um, tá tey fara í hagan, og ikki tveita líkt og ólíkt eftir sær.

Eitt annað, sum borgarstjórin tekur í allarstørsta álvara er, at rottur ikki sleppa út í oynna.

- Tað ringasta, sum kann henda fyri drunnhvítan og fyri fuglin í síni heild, er um rotta kemur í oynna. Og teir, sum kenna til rottu siga, at er hon fyrst komin í oynna, slepst ikki av við hana aftur, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin heitir tí á fyrst og fremst heilsølur og aðrar veitarar av vøru av ymsum slag til Nólsoyar um at ansa stak væl eftir, so rotta ikki sníkir seg millum vøruna, og so sjálvandi eisini á Strandferðsluna um somuleiðis at halda eyga við flutninginum, so rotta ikki kemur í oynna.

## Staðfestast

Fyrr í ár ljóðaði annars, at farvegur eftir ráttu var staðfestur, men hóast nógvar fellur og drúgvar kanningar fekst ongantíð heilt greiða á, um rotta veruliga var komin í oynna.

Ongantíð sást hon og ongantíð fekst við vissu staðfest um talan var um rottu ella ikki. Men nú skal so finnast út av hesum.

- Vit hava fingið eitt elektroniskt tól, sum við hitasøkjan og rystingum skal staðfesta, um rotta er í oynni ella ikki, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at nú Ternan er farin at sigla um Nólsoyarfjørð, er vandin fyri at rotta ótilvitað kemur út í oynna munandi størri, enn tá Ritan sigldi.

- Nú tað ber til at koyra í land í Nólsoy er neyðugt, at fólk eru sera varin, so tey ikki flyta rottu til Nólsoyar av óvart, sigur Heðin Mortensen.

Nólsoy er annars ein av fáu oyggjunum, har rotta ikki livir.

## Skjót sigling

Nólsoy er ein av trimum økjum, sum er í uppskoti at gerast eitt sonevnt Ramsaøki. Hetta eru økir, sum verða friðað í einum altjóða høpi.

Fundur hevur fyri stuttum verið í Føroyum, sum í ár er komið upp í Ramsa samstarvið.

- Hetta hevur sjálvandi eisini týdning, men tað er í kapasitetinum sum verji hjá drunnhvítanum, at eg fyrst og fremst taki hesi stigini, til tess at verja fuglalívið í Nólsoy, sigur Heðin Mortensen.

Og eitt, sum er til stóran bága fyri alt fuglalív í oynni, er bátarnir, sum við 30-40 míla ferð fresa tætt framvið landi, ofta heilt inn í klettin.

- Har ætla vit fyrst og fremst at tosa við fólkini, sum hava við ferðavinnu at gera, og eg ivist onga løtu í, at vit finna eina loysn, sum báðir partar kunnu liva við, sigur Heðin Mortensen.

Hann sigur, at skulu bátarnir sigla so skjótt, má tað verða við einari ávísari fjarðstøðu úr landi, og skulu teir inn í ymsar holur, má tað gerast við hampiligari ferð, so hetta ikki órógvar fuglin.

- Ber ikki til at tosa seg til rættis, so má landsstýriskvinnan upp í leikin og lóggeva á økinum, sigur Heðin Mortesen.


Maskinmeistari



**SEV sóknast eftir einum dugnaligum maskinmeistara at byrja skjótast til ber á elverkinum á Strond í Klaksvík.**

Elverkið á Strond hevur um hendi rakstur og hald av sjálvum elverkinum á Strond, viðlíkahald av mobilaggregatum eins og viðlíkahald av teimum fimm smáverkunum á Fugloynni, í Mykinesi, á Skúvoynni, í Koltri og á Stóru Dímun, ið tilsamans hava 14 framleiðslueindir. Hartil eru 3 eykaverk, sum eisini hoyra til starvsøkið. Á elverkinum á Strond starvast í løtuni 2 fólk umframt verkmeistaran.

**Starvið**
Tann, ið settur verður, verður settur í fast starv hjá SEV og fer fyrst og fremt at arbeiða á elverkinum við Strond, og út frá hesum arbeiðsstaði til hini elverkini eftir tørvi. Talan er fyrst og fremst um dagarbeiði, men talan kann blíva um nakað av vaktararbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Førleikakrøv**
Tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.e. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir á økinum ella á líknandi øki.

**Løn**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið. Starvið er flokkað í lønarflokki 12. Byrjunar- og endalønin í 12. lønarflokki er í løtuni netto ávikavíst kr. 28.686,33 og kr. 29.898,81 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavíst kr. 3.872,65 og kr. 4.036,34 um mánaðin.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá próvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til Elfelagið SEV, Postrúm 319, 110 Tórshavn.

**Umsóknarfreistin er mikudagin 10. november 2010.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Jákup Petersen, verksmeistara ella til Anders Nedergaard-Hansen, leiðara á Framleiðsludeildini, báðir á telefon nr. 346800.

SEV


# Móttøka fyri Jón

**Seinasta fríggjadag var móttøka í sambandi við, at Jón Simonsen tók við starvinum sum stjóri á Skyn 1. oktober**

Leo Poulsen

Fitt av fólki høvdu leitað sær inn í hølini hjá Skyn fríggjadagin, har móttøka var fyri Jón Simonsen í sambandi við, at hann tók við sum stjóri í meklarafyritøkuni hjá BankNordik 1. oktober.

Jón Simonsen kom frá kappingarneytanum hjá Skyn, og hevur starvast innan vinnuna í eini tíggju ár.

Nýggi stjórin er eisini kendur frá ítróttaheiminum og hevur millum annað staðið á odda fyri besta liðnum hjá ÍF í Vodafonedeildini.

Jón Simonsen er fuglfirðingur og koyrir ímillum heimbygdina og arbeiðsplássið.

Á móttøkuni nýtti stjórin í BankNordik, Suni Schwartz Jacobsen, høvi at siga nøkur orð.



*Suni Schwartz Jacobsen segði nøkur orð á móttøkuni, vend móti Jón Simonsen*

Mynd: Jens Kristian Vang